# va ein sang



**INNANFYRI**

*– Tað var kendi sangurin "Indenfor eller udenfor, hvor skal du stå engang?", sum vakti meg til frelsu. Eg vildi so gjarna standa innanfyri dyrnar, sigur Fríðgerð Kjærbo úr Skopun. Nú skrivar hon sínar egnu sangir*

føldist tað sera gott, og nú ynskti eg bara at sleppa út at syngja hann fyri øðrum.

– Hetta gjørdi eg í Betania, og vóru tey sera fegin um sangin.

**Tvær reglur vanta**

Higartil til dags hevur Fríðgerð skrivað einar 20 sangir og umsett nakrar. Teir flestu eru vorðnir til, eftir at hon hevur hoyrt eina góða talu á møti ella í sjónvarpi.

– Men teir koma eisini, tá eg søki Jesus, og hann verður mær stórur. Tað er bara so fantastiskt, at ein kann koma til Hann við øllum og so kann ein bara takka honum fyri alt tað sum hann hevur gjørt fyri meg.

Seinasti liðugt skrivaði sangur hennara er skrivaður fyri júst ein-

**»** **Kanska er tað nakað langt síðani eg skrivaði ein sang, men eg havi ein sang liggjandi her. Hetta er ein sangur til heimbygdina, Gjógv**

um ári síðani – sangurin "Sum eg ferðist á vegnum til himmals", ið er dagfestur 29. januar 2010.

– Kanska er tað nakað langt síðani eg skrivaði ein sang, men eg havi ein sang liggjandi her. Hetta er ein sangur til heimbygdina, Gjógv.

– Her mangla bert tvær reglur, so tað kundi verið so skjótt. Eg havi ikki skrivað hann til nakað serligt høvi, men ætli hann bara sum eina gávu til heimbygdina.

*(PS: Eftir samrøðuna við Oyggjablaðið setti Fríðgerð seg aftur við bygdarsanginum. Og løtu seinni var hann liðugur!)*

*snorri@sosialurin.fo*

# Kallið



**TÓNLEIKUR**

*- Eg elski tónleik, sigur 63 ára gamla Fríðgerð Kjærbo. Øll børnini spæla uppá okkurt ljóðføri, og sonurin, Ásbjørn Fríðálv Kjærbo hevur eisini givið okkurt út*

**Fyrsti sangurin hjá Fríðgerð var sangurin Kallið, ið hon yrkti í mai mánaði fyri skjótt 25 árum síðani.**
**– Teksturin kom bara til mín, og hann var liðugur her og nú, sum hon greiðir frá.**

Eg hoyrdi teg kalla, men eg hevði ei tíð,
eg hugsaði bert um tað verðsliga lív.
Eg vildi ei sleppa tí ið heimur mær beyð,
eg sá ei at tað kundi blíva mín deyð.
Eg gekk mína leið. Eg gekk mína leið.
Eg søkti ei Jesus, men gekk mína leið.

Men Jesus, hav takk at tú gloymdi ei meg,
tú sá at eg eisini tørvaði teg.
Tú kallaði aftur, eg kendi við mær,
tú bað meg koma og fylgjast við tær.
At fylgjast við tær. At fylgjast við tær,
tú bað meg tá koma og fylgjast við tær.

Og Jesus, eg komi, eg leingist til tín,
tú reinsa meg, Jesus. Eg vil verða tín.
Og leiða tú skalt meg á vegnum so væl,
til ein dag eg náa skal himmalsins sal.
Ja, himmalsins sal. Ja, himmalsins sal,
til ein dag eg náa skal himmalsins sal.

Ja, Jesus, tann besti er í hesi verð,
Hann vegurin, lívið og sannleikin er.
Lat heimin bert lokka og draga til sín,
men Jesus eg alla tíð verða vil tín.
Eg vil verða tín. Eg vil verða tín,
mín Jesus, eg alla tíð verða vil tín.

Og kom kæri vinur, sum leitandi ert,
kom tak móti Jesusi og frelstur tú gerst.
Ein bústað til reiðar, hann gjørt hevur tær,
Hann bíðar nú eftir at fáa títt svar.
Kom, sig honum ja. Kom, sig honum ja.
Kom tak móti Jesus. Kom sig honum ja.

Orð/lag: Fríðgerð (mai 1986)